VB-B68:

B68 hongur í leysum lofti

Liðformaðurin er leikbannaður, tá ið toftamenn í morgin fara at hava ryggin ímóti garðinum, tá ið teir skulu takast við VB, sum hevur mist ein av teimum drúgvastu

UPPTAKT
Jóannes Hansen

Hóast støðan sær alt annað enn hugalig út, so hava teir í B68 ikki givið skarvin yvir. Í morgin skulu teir spæla á Vágseiði, og B68 tekur uppgávuna í stórum álvara. Longu í kvøld fara spælararnir suður. Teir skulu vera so væl fyri, sum tað ber til, tá ið teir skulu stríðast fyri lívinum í bestu deildini.

Um ÍF vinnur á heimavølli ella um B68 ikki fær fult í Vági, so er B68 flutt niður, og tað ætla Trygvi Mortensen og hansara menn sær ikki bara skal staðfestast, uttan at teir hava stríðst fyri sínum møguleika.

Hjá B68 er miðvallar generalurin og liðformaðurin, Øssur Hansen, leikbannaður, tí hann hevur fingið trý gul kort. Alex Troleis hevur verið skaddur rættuliga leingi, men nú er hann tøkur aftur. Herbert í Lon Jacobsen, sum í Intertoto Cup dysti fyrr í summar breyt beinið, hevur vant við í hesi vikuni. Men hann verður ikki tøkur fyrrenn annað vikuskifti.

Á Toftum siga teir, at lagið hevur verið gott undir venjingunum. Síðst var leikluturin hjá brasiliumonnunum ikki serliga stórur á B68 liðnum. Spurningurin verður so, hvussu hann fer at verða í morgin.

Higartil í ár hevur tað ikki eydnast hjá B68 í fjúrtan royndum at fáa fult nakra ferðina.

Lyklaspælarin burtur

Hjá VB eru flestu spælararnir, sum hava verið við seinastu vikurnar, tøkir. Palli Augustinussen, sum í fleiri ár hevur verið miðvallari í høgra borði, og sum í 2000 var ein av høvuðsspælarunum á liðnum, sum vann meistaraskapin, verður ikki við restina av hesum árinum.

Gurið Mortensen er sloppin inn at læra til fysioterapeut í Næstved, og Palli er farin niður saman við henni.

Í sjey heimadystum higartil í ár hevur VB vunnið tríggjar, meðan teir hava tapt tveir og spælt tveir javnar. Vágbingar fara at gera alt fyri at hava so góðan sluttspurt upp á kappingarárið, sum tað á nakran hátt ber til.



Skulu toftamenn hava nakran møguleika at halda sessinum í deildini, so eru trý stig kravið, tá teir sunnudagin vitja í Vági

NSÍ-GÍ:

GÍ tevjar málm

Men í Gøtu ásanna teir, at tað verður ikki lætt ímóti NSÍ, sum ofta hevur funnið eyka gir, tá ið teir hava sæð gult og blátt

UPPTAKT
Jóannes Hansen

Burtursæð frá tórsigrinum á Toftum fyri fýra vikum síðani, so hevur tað ikki gingið væl hjá NSÍ, síðani teir á Ólavsøku taptu steypafinaluna. Teir hava tapt hvørja ferð, og nú eru teir niðanfyri miðstrikuna, og tað eru fleiri í Runavík, sum siga, at teirra lið tykist vera farið meiri ella minni í vetrardvala. Hetta kennist eitt sindur snópisligt, tí ætlanin ella rættari dreymurin hjá fleiri var, at liðið enn eina ferð skuldi røkka europeiskari luttøku.

Í Gøtu vilja teir ikki hoyra talan um, at tað verður lætt hjá teirra monnum í Runavík.

– Tá ið NSÍ spælir ímóti okkum klára teir seg oftast væl. Tað kennist sum um, at teir finna eitt eyka gir ímóti okkum. Soleiðis rokna vit eisini við, at tað fer at verða hesa ferð, siga teir í Gøtu.

Eftir at tað leingi ikki gekk nakað serligt hjá GÍ, eru teir nú komnir soleiðis fyri, at teir kunnu røkka bronsuni, um tað lagar seg væl, og GÍ vinnur í dag, og Skála tapir ímóti KÍ, og GÍ næsta sunnudag vinnur á heimavølli ímóti júst Skála.

Í Gøtu er alt fólkið tókt. Liðformaðurin, Poul Ennigarð, var leikbannaður á Eiði, men hann er tøkur aftur.

Tað hevur leingi verið upp á tal, og nú siga teir tað verða veruleiki. Gamli landsliðsspælarin og GÍ miðvallarin, Sámal Joensen, er á veg aftur í fremstu røðina í føroyskum fótbólti. Hann hevur verið sjómaður síðstu tíðina. Nú ætlar hann fyribils at leggjast uppi, og tá ið landskappingin verður liðug, fer Sámal at venja saman við GÍ, sum hann næsta ár ætlast at skula vera við at lyfta.

NSÍ venjarin hevur síðstu vikuna verið upptikin av landsliðsarbeiðnum. Í NSÍ hava teir kortini vant sum vanligt, og mánakvøldið og týskvøldið var Jógvan Martin Olsen í Runavík og vandi saman við teimum. Hjá venjaranum ræður um at syrgja fyri, at spælararnir fara á vøllin við stórum íblástri.

Hjá NSÍ er Brynjolvur Nielsen leikbannaður eftir reyða kortið, sum hann fekk í Klaksvík. Kári Hansen, sum var leikbannaður ta ferðina, er tøkur aftur.

ÍF-EB/Streymur:

Fuglfirðingar hava nógv at prógva

Fyrra dystin millum ÍF og EB/Streym í hesum kappingarárinum vunnu sundalagsmenn ikki minni enn 7-0. Sunnudagin ætla fuglfirðingar at prógva, at talan tá var um eitt mistak, ið er farið í gloymibókina

UPPTAKT
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Tað var ein ræðuligur dystur fyri ÍF, tá ið teir fyrr í ár vitjaðu á Eiði. Ein dyggur ósigur upp á 0-7, umframt tvinni reyð kort til fuglfirðingar, var einki minni enn ein katastrofa.

Góðar vónir

Fuglfirðingar noyðast at gera tvær broytingar á liðnum hjá sær til dystin sunnudagin. Verjuleikarin Fritleif í Lambanum er leikbannaður, og tað sama er Høgni Madsen. Óivað fer Viggo Johannesen at loysa Fritleif av í verjuni, meðan Eyðálvur Petersen avloysir Høgna av á miðvøllinum.

Ein av fastu monnunum í verjuni hjá ÍF, Rúni Elttør, hevur eisini ligið sjúkur í vikuni, men væntandi verður hann klárur sunnudagin. Rúni Elttør sigur, at annars sær tað hampiliga gott út við fólki í Fuglafirði. Hann heldur, at teir báðir útlendsku spælararnir, ið komu eftir summarsteðgin, hava gjørt stóran mun, og eftir hansara tykki hevur ÍF spælt heilt væl í seinastuni.

– Vit spældu fult upp við HB í Havn og kundu eins væl havt vunnið tann dystin, hóast vit taptu 2-4. Tá ið vágbingar vitjaðu í Fuglafirði, spældu vit aftur ein góðan dyst, og tá eydnaðist tað okkum eisini at fáa øll trý stigini. Eg vænti tí eisini, at vit vinna dystin sunnudagin, og leikararnir eru eisini øgiliga uppsettir upp á at prógva, at dysturin á Eiði var eitt undantak, ið ikki átti at komið fyri, sigur Rúni Elttør.

Neyvan nøkur endurtøka

Hjá EB/Streymi sær tað heilt hampuligt út við fólki til dystin sunnudagin. Tað er tó greitt, at Carl Høgnesen ikki verður at siggja aftur á liðnum í ár, tí hann er farin uttanlands í lestrarørindum. Harafturat er ivasamt, um liðskiparin, Jákup Martin Joensen, verður við, tí hann hevur trupulleikar í knænum. Jákup Martin royndi at venja við hóskvøldið, men tá ið Sosialurin tosaði við hann seinni um kvøldið, hevði hann lítlar vónir um at gerast klárur til dystin sunnudagin.

Jákup Martin sigur annars, at teir vænta ikki, at talan verður um nakra endurtøku av dystinum á Eiði, tá ið ÍF og EB/Streymur hittast í Fuglafirði sunnudagin.

– Eg trúgvi ikki uppá, at ÍF fer at tapa 0-7 enn einaferð, men vit eru eisini sera væl nøgdir, um vit bara vinna við einum máli, sigur Jákup Martin Joensen. Liðskiparin hjá EB/Streymi dylur ikki fyri, at teir fara eftir øllum trimum stigunum í Fuglafirði sunnudagin.

Skála-KÍ:

Jákup er enn eina ferð skaddur

Jónhard Frederiksberg er farin til sjós og fleiri aðrir lyklaspælarar á Skála eru burturi frá, tá ið KÍ við tveimum sigrum á rað, kemur at vitja

UPPTAKT
Jóannes Hansen

Hjá KÍ er Jákup Mikkelsen ikki tøkur, og eisini hjá Skála eru týðandi leikarar burturfrá hesaferð

Mikukvøldið var Jákup Mikkelsen rættuliga í hopla, tá ið Føroyar og Frakland spældu. Hóskvøldið var Jákup til venjingar í Klaksvík, og tá hilnaðist tað ikki eins væl, og tað gjørdi undir venjingunum hjá landsliðnum.

– Eg skuldi royna ein spurt, og so kendi eg, at tað var eitt ella annað, sum dragnaði í lærinum. Talan er um tann sama, men kortini ikki eins álvarsama, skaðan, sum í august helt mær burtur frá fótbólti, sigur Jákup Mikkelsen. Hann roknar ikki við at verða førur fyri at spæla á Skála í morgin, men hann roknar við og vónar, at hann verður tøkur, tá ið HB fer at koma til Klaksvíkar.

– Jan Andreasen er leikbannaður. Hann hevur síðstu ferðirnar staðið seg ógvuliga væl í miðverjuni, men nú verður neyðugt at gera onkra broyting, sigur Jákup Mikkelsen.

Alt bendir á, at tað verður 16 ára gamli Mattias Samuelsen, sum fer at verja KÍ málið, um Jákup ikki verður førur fyri at spæla. Andreas Johannesen vardi málið, tá ið Jákup fyri einum mánaði síðani var skaddur. Hann er burtustaddur, og tí er tað, at Mattias Samuelsen møguliga skal í málið at standa. Mattias var á U-17 landsliðnum, sum fyrr í summar luttók í NM kappingini og avgjørt ikki gjørdi sær fyri skommum.

Stórt mannfall á Skála

Tá ið vit seinast vóru í sambandi við Skála, sá myndin alt annað enn vøkur út. Tað var heilt víst, at fýra av føstu monnunum ikki fóru at vera førir fyri at spæla, og tað var rættuliga stórur ivi um tveir afturat.

Eftir skandalu dystin fyri Skála í Gundadali ímóti B36 eru tveir spælarar leikbannaðir orsaka av reyðum kortum. Teir eru miðverjin Dusan Jaic og miðvallarin Nenad Stankovic. Tað er greitt, at Pauli G. Hansen, sum var illa skaddur í knænum í Fuglafirði fyri nøkrum vikum síðani, ikki verður førur fyri at spæla. Og so eru tað stóru ivamálini. Tey eru Bogi Gregersen og Arnhold Berg. Hvørgin teirra hevur vant í heilt nógvar vikur. Arnhold Berg plágast av skaða í ryggínum. Han hevur runnið smávegis, men higartil hevur restað í hjá honum. Bogi Gregersen stríðist við liðbandsskaða í fótliðnum. Tað er møguleiki fyri at annar ella hin av omanfyri nevndu fer at verða tøkur, men í gjár sá einki út.

Undan vikuskiftinum bendi alt á, at landsliðsspælarin, Jónhard Frederiksberg, ikki verður við ímóti KÍ. Hann gongur í skipsførara flokki í Havnini. Eina ferð um árið skipar navigatiónsskúlin fyri venjingartúri niður í Ermasund. Sum vit hava skilt tað, so er tað júst hetta vikuskiftið, at hesin túrurin ferður gjørdur saman við Jónhardi Frederiksberg og floksfeløgum hansara.

Fraklendingar fáa av at vita

Fronsku miðlarnir eru ikki blíðir við sínar landsliðsmenn eftir dystin í Føroyum mikudagin. Leikararnir hjá Fraklandi fáa at vita, at teir eru nakrir letingar, ið ikki kenna til orðið stríðsvilji

EFTIRMETINGAR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Tað er ikki altíð lætt at verða franskur landsliðsleikari. Ikki er nóg mikið hjá fronsku stjørnunum at fáa tey neyðugu trý stigini til høldar, tí spælið skal eisini verða sannførandi, um fronsku fjølmiðlarnir skulu verða nøgdir.

Langur vegur til Týsklands

Stóra avísin, Le Monde, skrivar í hósdagsútgávuni hjá sær, at franska liðið helt fast í møguleikanum hjá sær fyri at røkka HM-endaspælinum í Týsklandi, men at vegurin er ógvuliga langur og tungur, um avrikini hjá franska liðnum ikki gerast meiri sannførandi.

– *Móti einum liði, sum liggur nummar 137 á styrkislistanum hjá FIFA, megnaði franska liðið, ið liggur nummar tvey á sama lista, ikki at vísa munin á liðunum báðum. Við tveimum málum frá Ludovic Giuly og Djibril Cisse fekk Frakland neyðugu stigini, men so er ikki meiri positivt at skriva um handan dystin sæð við fronskum eygum. Eingin vilji og einki hugflog til at vinna ein tryggari og meiri sannførandi sigur á lítla vøllinum í Tórshavn. Hinvegin sást tó eisini, at tað ikki er av tilvild, at føroyingar hava tikið stig frá skotum, og bert verið fáar minuttir frá at tikið stig frá týskarum eisini*, skrivar Le Monde.

Vóru trýstir

Ein onnur av teimum heilt stóru avísunum í Fraklandi er Le Figaro. Heldur ikki her eru blaðfólkini blíð við franska liðið. Eftir dystin móti Ísrael á heimavølli seinastu vikuskifti, har tað einans eydnaðist at fáa javnleik, fekk franski venjarin Raymond Domenech av grovfilini, tí hann hevði valt at skifta spælskipan á franska liðnum frá 4-4-2 til 3-5-2. Í dystinum mikukvøldið á Tórsvølli var farið aftur til 4-4-2, men tað er ikki nóg mikið fyri Le Figaro.

– *Tað var gleðiligt at síggja, at farið var aftur til 4-4-2, men tíverri tóktist tað als ikki sum um, at leikararnir á franska liðnum vistu, hvør teirra leiklutur var. Í byrjanini av dystinum vóru tað føroyingarnir, sum vóru omaná, og tað var ikki fyrr enn í 25. minutti, at les Bleus høvdu sína fyrstu royndd upp á mál*, skrivar Le Figaro.

– *Eftir óneyðugu og tápuligu útvísingina hjá Vieira, vóru føroyingarnir aftur við yvirlutan, og tað varð hugstoytandi at síggja eitt franskt lið, sum dúvaði upp á kontrafótbólt ímóti einari so lítlari fótbóltstjóð sum Føroyum*, skrivar Le Figaro millum annað. Franska blaðið heldur at enda, at vegurin til Týsklands er langur, sera langur.

Nógv skal henda áðrenn Írlandsdystin

Størsta ítróttarblaðið í Fraklandi er Le Equipe. Blaðmaðurin, Cedric Rouquette, skrivar í síni grein, at nógv skal henda, um fraklendingar ætla at gera nakað sum helst við írar, sum koma á vitjan í Fraklandi tann 9. oktobur.

– *Tað er óskiljandi, at eitt franskt landslið í 20 minuttir velur at leggja seg aftur at verja ímóti einum liði av amatørum. Eitt franskt landslið, sum í juni mánaða kappaðist um Europameistaraheitið í fótbólti, men sum við slíkum avrikum sum í gjár neyvan kemur at taka lut í slíkum endaspælum fyribils.*

– *Hetta er ikki ein sigur, sum er verdur at skriva um. Tað einasta gleðiliga við dystinum var, at vit fingu øll trý stigini. Móti Írlandi í Paris 9. oktobur verður søgan ein heilt onnur*, skrivar Le Equipe.

Týr hitar upp

Í sambandi við 100 ára føðingardagin hjá HB, skipar havnarfelagið fyri ymiskum undirhaldi í sambandi við dystin móti B36

FÓTBÓLTSKARMAR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

HB ger eitt sindur eyka burturúr, nú teir sunnudagin spæla klassisku grannauppgerðina móti B36. Ein hálvan tíma áðrenn dysturin fer í gongd, fer væl umtókti rokkbólkurin TÝR at spæla við tennisvøllin.

Í hálvleiksteðginum fara dansigentur úr Havnar Fimleikarfelag at undirhalda á vøllinum - eitt fyribrigdi sum fleiri onnur felóg í landinum eisini nýta til teirra heimadystir. Dystirnir millum HB og B36 eru nakað heilt serligt, og er hetta orsøkin til, at so nógv verður gjørt burtur úr júst hesum dysti. At HB hevur møguleika fyri at ogna sær meistaraheitið sunnudagin, sigst einki hava at gera við tiltakið, verður sagt í tíðindaskrivi.

1. deild menn

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 HB	14	11	-	2	-	1	40	12	28	35
2 B36	14	8	-	3	-	3	26	15	11	27
3 Skála	14	8	-	2	-	4	28	18	10	26
4 GÍ	14	6	-	3	-	5	24	25	-1	21
5 VB	14	5	-	4	-	5	18	16	2	19
6 KÍ	14	4	-	7	-	3	19	18	1	19
7 NSÍ	14	5	-	3	-	6	22	19	3	18
8 EB/Streymur	14	5	-	3	-	6	23	21	2	18
9 ÍF	14	3	-	1	-	10	20	43	-23	10
10 B68	14	0	-	2	-	12	10	43	-33	2

2. deild menn

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 AB	14	9	-	2	-	3	25	17	8	29
2 TB	13	9	-	1	-	3	35	16	19	28
3 B71	14	8	-	2	-	4	36	27	9	26
4 Royn	14	8	-	0	-	6	34	31	3	24
5 Sumba	14	6	-	4	-	4	21	22	-1	22
6 FSV	13	6	-	3	-	4	44	24	20	21
7 LÍF	14	6	-	3	-	5	24	27	-3	21
8 B36	14	3	-	2	-	9	19	41	-22	11
9 KÍ	14	2	-	3	-	9	22	32	-10	9
10 VB	14	0	-	4	-	10	13	36	-23	4